LØGMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF JUSTICE

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208
110 Tórshavn

Tórshavn, tann: 7. mars 2025
J. nr.: 25/05759-2

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-088/2024 eftir § 52 a í tingskipanini um at tað eru trý ár síðani, Russland leyp á Ukraina, frá Kristionnu Winther Poulsen, løgtingskvinnu

Spurningarnir vóru soljóðandi:

1. Hvussu nógv flóttafólk úr Ukraina, kvinnur, menn og børn, eru higartil komin til Føroya, og hvar í Føroyum búgva tey?
2. Hvussu gongur hjá ukrainskum flóttafólki at fáa arbeiði í Føroyum?
3. Er landsstýrismaðurin sinnaður at gera serligar skipanir fyri at betra atgongdina til arbeiðsmarknaðin fyri ukrainsk flóttafólk?
4. Hvørjar royndir eru við arbeiðinum hjá samskipandi eindini, sum landsstýrið hevur sett at arbeiða við ukrainsku flóttafólkunum?
5. Hvørjar eru størstu avbjóðingarnar hjá ukrainunum, børnum og vaksnum, sum eru komin til Føroya?
6. Hvussu hava vit sum samfelag sum heild megnað at tikið ímóti ukrainsku flóttafólkunum?

Svar:

Til spurning 1
Tilsamans eru 271 umsóknir um uppihaldsloyvi í Føroyum eftir Ukraina-serlógini latnar inn. 249 hava fingið uppihaldsloyvi. Av hesum eru 142 kvinnur, 34 menn og 73 børn. Mett verður, at umleið 66 fólk eru farin avstað aftur, t.v.s. at umleið 183 persónar, sum eru riknir úr Ukraina, eru

búsitandi í Føroyum í løtuni. Talið av ukrainum, sum hava tilhald í Føroyum, kann vera skiftandi, tí tey kunnu fara úr Føroyum í upp til 6 mánaðir. Tey allar flestu búgva í Tórshavn, meðan nøkur búgva við Skálafjørðin, í Klaksvík, á Tvøroyri, í Skálavík og í Fuglafirði.

Til spurning 2
Almannaverkið upplýsir, at í løtuni fáa 64 av teimum burturriknu ukrainunum, sum eru arbeiðsførir, fyribils uppihaldsveiting. Almannaverkið heldur ikki, at tað gongur væl hjá ukrainunum at fáa arbeiði. Ábendingar eru um, at teir ukrainar, ið duga enskt ella eitt sindur av føroyskum, hava betri útlit til at fáa arbeiði enn teir, ið ikki duga føroyskt ella enskt.

Almannaverkið upplivir minni vælvild millum arbeiðsgevarar at seta burturriknar ukrainar í starv og heldur, at ymiskar orsøkir kunnu verða til hetta. Nevnt verður manglandi lóggáva til at seta virknisvenjing í gongd eftir løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk, hetta vegna fyribils uppihaldsloyvi.

Almannaverkið heldur, at ein onnur orsøk til, at summir arbeiðsgevarar kunnu vera afturhaldandi við at bjóða fast starv, og í staðin bjóða tíðaravmarkað starv, er, at ukrainarnir hava fyribils uppihaldsloyvi, ið bara verður longt eitt ár í senn.

Harumframt eru ukrainarnir óvissir um bústøðu sína, sum hjá teimum flestu bara er fyribils. Teir skulu tí skifta bústað fleiri ferðir. Kropsliga heilsan og sálarheilsan hjá teimum og/ella familju teirra er ein viðvirkandi orsøk til, at tað er torført at fáa tilknýti til føroyska arbeiðsmarknaðin.

Almannaverkið upplýsir, at tey síggja vælvild frá ymiskum arbeiðsgevarum at seta ukrainar í starv, men at tað er tørvur á fleiri. Hjá teimum arbeiðsgevarum, ið hava víst vælvild, riggar tað sera væl at hava ukrainar í starvi.

Til spurning 3
Serligar skipanir fyri at betra um atgongdina til arbeiðsmarknaðin, so sum virknisvenjing, hoyra til málsøkið hjá landsstýrisfólkinum í almanna- og mentamálum. Spurningurin, um at gera serligar skipanir fyri at betra atgongdina til arbeiðsmarknaðin fyri burturriknu ukrainarnar, má tí stílast landsstýrisfólkið í almanna- og mentamálum.

Til spurning 4
Samskipandi eindin viðvíkjandi burturriknu ukrainunum hevur havt 5 fundir síðani apríl 2023. Luttakararnir á fundunum hava verið umboð fyri ymisk stjórnarráð, almennar stovnar, kommunur, Føroya Politi og Reyða Kross.

Endamálið við fundunum hevur verið at kunna hvønn annan um gongdina við burturriknu ukrainunum og at umrøða og royna at finna loysnir á aktuellum avbjóðingum og trupulleikum hjá ukrainunum. Millum evnini, sum hava verið umrødd, er fíggjarliga støðan hjá teimum vegna lágar uppihaldsveitingar, trupulleikar við at fáa fast arbeiði vegna m.a. vantandi málførleikar, undirvísing í føroyskum og avbjóðingar í hesum sambandi, sálarligar avbjóðingar, trupulleikar við

at finna bústaðir, ung undir 18 ár, sum eru komin einsamøll til Føroyar, skúlagongd, serliga hjá ungum ukrainum, fatanin av heilsuskipan okkara og tulking.

Á fundunum hava viðkomandi myndugleikar avtalað at royna at loysa trupulleikarnar. Til dømis hevur Almannaverkið skipað fyri serligari praktikkskipan, virkisvenjing og turboskeiði fyri at fáa fleiri ukrainar í arbeiði, Tórshavnar kommuna hevur sett flóttafólkasamskipara, sum m.a. skipar fyri ymiskum tiltøkum fyri ukrainar, Løgmálaráðið hevur játtað pening til Beran fyri at veita ukrainum sálarfrøðiliga hjálp, Útlendingastovan hevur hjálpt ukrainum at finna bústaðir, og ein leistur er avtalaður millum avvarðandi myndugleikar viðvíkjandi einsamøllum, ómyndugum ukrainum, sum eru komnir til Føroyar.

Samanumtikið hava royndirnar við samskipandi eindini verið góðar, tí fundirnir hava varpað ljós á aktuellar trupulleikar hjá burturriknu ukrainunum, og loysnir eru funnar, hóast allar avbjóðingar og trupulleikar ikki eru loystir.

Til spurning 5
Millum størstu avbjóðingar hjá ukrainunum eru at læra føroyska málið, at finna arbeiði, at finna bústað, at fáa hóskandi útbúgvingartilboð til ung og at fáa samband við heilsuverkið. Kanningar úr londunum rundan um okkum vísa eisini, at ukrainar har hava líknandi avbjóðingar í teimum londunum.

Til spurning 6
Útlendingastovan hevur í samstarvi við Anniku Helgadóttir Davidsen, adjunkt í sálarfrøði á Setrinum, gjørt eina stutta frágreiðing, sum væntandi kemur út skjótt. Frágreiðingin er grundað á eina spurnakanning millum ukrainar, sum gevur innlit í, hvussu tey uppliva móttøkuna. Kanningin vísur m.a. á, at tað sum heild hevur eydnast at bjóða ukrainunum hóskandi vælferðartænastur og tilboð. Tey flestu av teimum spurdu svara, at tey eru væl nøgd og takksom fyri hjálpina og blíðskapin, sum tey hava fingið her. Kanningin vísur eisini, at teir ukrainar, sum hava svarað, umframt børn teirra, siga seg hava eina góða lívsgóðsku, eina rímiliga sálarheilsu og ein virknan gerandisdag. Kanningin vísur tó eisini, at summi, bæði vaksin og børn, stríðast við m.a. sálarligar avbjóðingar, arbeiðsloysi og manglandi bústað.

Hyggja vit eftir, hvørjar royndir londini rundan um okkum hava, sum hava tikið ímóti flóttum í nógv ár, so eru avbjóðingarnar tær somu har. Sum heild kann tí sigast, at vit sum samfelag hava loyst uppgávuna á nøktandi hátt higartil, tó at pláss er fyri betringum á fleiri økjum.

Løgmálaráðið 7. mars 2025

Bjarni K. Petersen
landsstýrismaður